Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi





# Kunning um undirvísingarátakið "Sára og Aleks"

Góðu foreldur og umsorganarpersónar

*Sára og Aleks* er ein liður í fyribyrgjandi arbeiðinum hjá SSP-samstarvinu; at tryggja trivnað og upplýsing til børn og ung í Føroyum. **SSP** er ein samstarvsskipan millum **S**kúla, **S**osialar myndugleikar og **P**oliti.

### *Hvat er "Sára og Aleks"?*

*Sára og Aleks* eru tveir stuttfilmar, ið vísa støður, har børn kunnu hava tørv á hjálp og stuðli. Endamálið er, at næmingar fáa vitan um nær talan er um vansorgan og ikki, um teirra rættindi til tryggan uppvøkstur og nær tað kann verða viðkomandi at fráboða og seta seg í samband við barnaverndartænastuna. Tilfarið leggur dent á opinleika og trygt samskifti, samt orðaskifti um tvístøðir og møguligar loysnir.

### *Vitjan frá barnaverndartænastum*

Ígjøgnum skúlaárið verður skipað fyri vitjanum millum skúlar og barnaverndartænastuna í økinum. Tað eru starvsfólk úr barnaverndatænastuni, ið undirvísa í "Sára og Aleks", har eisini SSP- lærari ella annar lærari er til staðar. Næmingar fáa sostatt høvi at heilsa uppá SSP- umboð fyri Sosialan myndugleikan í teirra øki og fyri skúlan.

Dentur verður lagdur á, at næmingar í flokkinum fáa innlit í, hvussu barnaverndartænastan kann hjálpa, um tørvur er á tí.

Tað er týdningarmikið at nevna, at vitjanirnar hava einki samband við einstøk mál hjá barnaverndartænastum.

### *Samstarvið ið hevur týdning*

Vit ynskja at skapa eitt gott og stuðlandi umhvørvi fyri øll børn og ung í Føroyum. Tá foreldur, skúlar og fakfólk arbeiða saman, kunnu vit virka fyri, at øll børn fáa bestu fortreytir fyri at trívast og mennast.

Til ber at síggja tilfarið "Sára og Aleks" á SSP.fo

Yvirlit yvir barnaverndartænastur í Føroyum sæst á BVS.fo

Heilsan SSP - samstarvið

Betri saman